Føroyingar við á altjóða oljumessu í Aberdeen:

# Marknaðarføra føroyskar fyritøkur og Offshore Faroes 2006

**– Føroysk luttøka á Offshore Europe hevur 10 ár á baki. Talið á luttakandi fyritøkum er í ár er tó væl minni enn í 1999 og 2001, men tær flestu av teimum hava við hepni luttikið á hvørjum ári. Talan er um eina miðvísa langtíðar íløgu hjá hesum fyritøkum, sum higartil hevur borið seg, og sum vit vænta fer at vísa seg sum eina góða íløgu sigur stjórin á Menningarstovuni, Kjartan Kristiansen**

OLJUMESSA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, sum hevur verið við til at skipa fyri mangari føroyskari luttøku á altjóða vinnuframsýningum og ráðstevnum er "still going strong" og hann heldur, at sjálvt um føroyskar fyritøkur innan oljuvinnu ikki er nógvar og heldur ikki stórar, so hava tær higartil víst ein javnan vøkstur í beinhørðu altjóða kappingini*

Aftur í ár eru Føroyar við á eini altjóða oljumessu, hesaferð í Aberdeen í Skotlandi. Tað er Oljuvinnufelagið, sum stendur á odda fyri føroysku luttøkuni á Offshore Europe 2005 í Aberdeen í tøttum samstarvi við bæði Menningarstovu og Oljufyrisiting.

Kjartan Kristiansen, stjóri á Menningarstovuni, sum hevur verið við til at skipa fyri mangari føroyskari luttøku á altjóða vinnuframsýningum og ráðstevnum er "still going strong" og hann heldur, at sjálvt um føroyskar fyritøkur innan oljuvinnu ikki er nógvar og heldur ikki stórar, so hava tær higartil víst ein javnan vøkstur í beinhørðu altjóða kappingini. Enn er kolvetni í rakstrarverdum nøgdum tó ikki funnið við Føroyar, og tí hava fyritøkurnar enn ongan heimamarknað.

Hann vísir á, at oljufeløgini eru í dag rættiliga vónrík um møguleikarnar fyri at finna kolvetni við Føroyar, bæði tey, sum skulu fara undir royndarboringar komandi ár, og tey, sum eru byrjað kostnaðarmiklar seismiskar kanningar í ár. Vónbrotini við fyrstu royndarboringarnar hava fingið oljufeløgini til at vera serliga varin við at siga nógv um útlitini fyri komandi royndarboringar. Júst tí mugu ætlað tiltøk og útsagnir metast rættiliga positiv.

Sum skilst væntar Oljuvinnufelagið, sum staðiliga hevur skipað fyri oljumessum í Føroyum seinastu árini, eisini stóra útlendska luttøku til Offshore Faroes 2006, sum verður hildin í Tórshavn í januar 2006, og Oljuvinnufelagið fer tí á "Offshore Europe 2005" at luta út atgongumerki, ferð og uppihald til Offshore Faroes 2006. Lutakastið fer fram á føroyska landabásinum á OE2005.

Sosialurin veit at siga, at Oljufyrisitingin væntar eisini stóran útlendskan áhuga í Faroe Islands Exploration Conference 2006, sum verður hildið í Tórshavn 12. og 13. september 2006. Ráðstevnan í 2004 var sera væleydnað, og luttøka í ár verður eitt "must" fyri øll, sum hava áhuga í kolvetni í føroyskum øki. Oljufyrisitingin fer at geva teimum, sum koma á føroyska básin á oljumessuni í Aberdeen møguleika at verða við í lutakasti um fría ferð, uppihald og luttøku á Faroe Islands Exploration Conference 2006.

Umframt tey, sum koma at hitta føroysku fyritøkurnar á básinum, væntar Kjartan Kristiansen, stjóri á Faroe Islands Trade Council - Menningarstovuni, sum saman við Oljuvinnufelagnum fyriskipar føroysku luttøkuna, tí at mong fara at vitja básin at frætta um útlitini og um Offshore Faroes 2006 og Faroe Islands Exploration Conference 2006. Sostatt er føroyska luttøkan á oljumessuni í Aberdeen í næsta mánað eisini ein marknaðarføring av teimum ráðstevnunum, sum verða í Føroyum næsta ár og sum báðar snúgva seg um eina framtíðar føroyska oljuvinnu.

Føroysk luttøka á Offshore Europe byrjaði í 1995. Talið á luttakandi fyritøkum er í ár væl minni enn í 1999 og 2001, men tær flestu av teimum hava við hepni luttikið á hvørjum ári. Talan er um eina miðvísa langtíðar íløgu hjá hesum fyritøkum, sum higartil hevur borið seg, og sum vit vænta fer at vísa seg sum eina góða íløgu. Føroyar hava eisini luttikið á oljumessum í Stavanger, ONS, annaðhvørt ár.




*Sum skilst væntar Oljuvinnufelagið, sum staðiliga hevur skipað fyri oljumessum í Føroyum seinastu árini, eisini stóra útlendska luttøku til Offshore Faroes 2006, sum verður hildin í Tórshavn í januar 2006*